Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Edva Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Klimaviðgerðartúrar til Kroatia fyri gikta- og psoriasissjúklingar

Spurningar:

1. Nú tá eingin sleppur klimaviðgerðartúrar til Kroatia, fáa so øll nøktandi viðgerðartilboð, bæði tey, sum ikki tola lívfrøðiligan heilivág, og tey, sum lívfrøðiligur heilivágur ikki veitir nóg góða hjálp?

2. Eru tað gikta- og psoriasissjúklingar, sum kunnu sigast at fáa verri viðgerðartilboð (detta niður ímillum), nú teir ikki sleppa til klimaviðgerðartúrar?

3. Hví er visitatiónin til hesar klimaviðgerðartúrar hjá Heilsuverki Føroya so nógv broytt, at hesir sjúklingar ikki sleppa hesar túrar, sum hava verið gjørdir í tættum samstarvi við Et Bedre Liv í Danmark?

4. Ætlar landsstýrismaðurin at eftirmeta skipanina við klimaviðgerðartúrum fyri at tryggja, at eingin dettur niður ímillum, grundað á eitt avtikið tilboð?

5. Ætlar landsstýrismaðurin at fáa formliga avtalu við klimaviðgerðardepilin í Kroatia ella við annan viðgerðarstovn uttanlands, soleiðis at viðgerð verður tryggjað fyri hesar sjúklingar?

Viðmerkingar:

Heilsuverk Føroya hevur í umleið 20 ár bjóðað fólki við gikt og psoriasis ein klimaviðgerðartúr, fyrstu árini til Íslands fyri sjúklingar við psoriasis, og seinnu mongu árini til Kroatia fyri bæði psoriasis- og giktasjúklingar.

Tað eru fleiri, sum ikki tola lívfrøðiligan heilivág ella sum ikki fáa nokk av hjálp við hesum heilivági. Fyri tey hevur klimaviðgerðartúrurin verið alt avgerandi sum viðgerðartilboð. Tó skal sigast, at fyri nógv er lívfrøðiligur heilivágur góður, og hesin heilivágur er við til at geva nógvum fólkum eina góða lívsgóðsku, og tað er at fegnast um. Tað virkar bara ikki sum viðgerð hjá øllum.

Tá sjúka rakar er sera týdningarmikið, at tryggleiki viðvíkjandi viðgerð er til staðar. Tað er krevjandi alla tíðina at skula brúka orku uppá at søkja og kanna uttan at vita, um møguleikin fyri viðgerðartilboðum er til staðar longur. Tí verður hesin spurningur settur.

Á Løgtingi, 13. september 2022

Edva Jacobsen